

*Brian Kerr, landsliðsvenjari, og Jákup Mikkelsen, málmansvenjari hjá landsliðnum*
Mynd: Álvur Haraldsen

# Landsliðsvenjarin umhugsar Jákup Mikkelsen

**FÓTBÓLTUR** Brian Kerr sigur, at hann hugsar avgjørt um møguleikan, um Jákup Mikkelsen verður tøkur sum landsliðsmálverji í komandi mánað

Uni Holm Johannesen

Tað er ikki óhugsandi, at Jákup Mikkelsen fer at verja málið hjá føroyska landsliðnum, sum skal spæla móti Slovenia og Norður Írlandi í komandi mánað.

Brian Kerr, landsliðsvenjari, vísir ikki møguleikanum aftur.

– Hann hevur boðað frá, at hann er givin á landsliðnum. Men um hann er tøkur til hesar dystirnar, so taki eg hædd fyri tí, sigur landsliðsvenjarin.

### Hevur staðið væl

Jákup Mikkelsen er 40 ára gamal.

Brian Kerr vísir á, at Mikkelsen hevur roynst sera væl hjá fuglfirðingum í hesum kappingarárinum. Landsliðsvenjarin er sannførdur um, at málverjin er framvegis førur fyri at standa seg í altjóða høpi.

– Hann er væl fyri og hevur drúgvar royndir sum málverji. Eg veit framvegis ikki, hvør fer at standa í málinum. Tað eru góðar tvær vikur, áðrenn hópurin verður úttikin. Nú fáa vit at síggja, sigur Brian Kerr.

Tórður Thomsen úr HB og Meinhardt Joensen úr B36 hava verið eykamálverjar á landsliðnum seinastu árini.

Jákup Mikkelsen hevur spælt 67 skrásettar landsdystir fyri Føroyar í alt.

### Gunnar er skaddur

Mikudagin var staðfest, at Gunnar Nielsen fer ikki at verja føroyska málið í komandi mánaða.

Hann fer ikki at spæla komandi seks vikurnar, tí hann hevur fingið skaða í økslina.

– Gunnar Nielsen hevur staðið seg væl í hesari undankappingini, og tað er harmiligt, at hann verður ikki tøkur. Hann hevur sáttmála við Tranmere til árskiftið, og tað er harmiligt, at hann hevur skaða at dragast við, áðrenn hann av álvara fær prógva seg, sigur Brian Kerr.

Komandi uppgávurnar hjá føroyska landsliðnum eru hin 8. oktober á útivølli móti Slovenia, og 12. oktober á heimavølli móti Norður Írlandi.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Jákupi Mikkelsen.

uni@sosialurin.fo

# Kósin er sett móti Vodafonedeildini



*Klaksvískingar og vágamenn hava beina kós uppaftur í Vodafonedeildina*
Mynd: Álvur Haraldsen

**1. DEILD** 07 Vestur og KÍ hava beina kós móti bestu deildini. Liðini øktu um fjarstøðuna til nærmasta kappingarneytan mikudagin

Uni Holm Johannesen

Fimm dystir eru eftir. Seks og fýra stig skilja liðini.

07 Vestur og KÍ hava bestu kortini á hondini, áðrenn endaspurturin í næstbestu deildini av álvara byrjar.

Bæði liðini vunnu greitt og uppiborið sínar dystir mikudagin. 07 Vestur vann 4-0 á útivølli móti FC Hoyvík, og KÍ vann 7-0 á Argjum móti næstbesta liðnum hjá AB.

uni@sosialurin.fo

*Úrslitini í 22. umfari vóru hesi:*

| | |
|---|---|
| **HB - TB** | **2-1** |
| (spældur hin 4. august) | |
| **FC Hoyvík - 07 Vestur** | **0-4** |
| **EB/Streymur – B68** | **5-1** |
| **AB - KÍ** | **0-7** |
| **NSÍ - Víkingur** | **0-2** |

*Leygardagin eru fimm dystir á skránni í næstbestu deildini. Teir eru hesir:*

**KÍ - HB**
**B68 - NSÍ**
**07 Vestur – AB**
**Víkingur - FC Hoyvík**
**TB - EB/Streymur**

# Landskappingardystur í kvøld

Fyrsti dysturin í 22. umfari í Vodafonedeildini verður avgreiddur í kvøld. **EB/Streymur** vitjar í Fuglafirði.

Bæði liðini hava tørv á trimum stigum, um sambandið við oddaliðið ikki skal rúka. Um **ÍF** ikki fær fult eru teir ikki longur við í kappingini um gullmerkið.

***Hinir dystirnir eru sunnudagin. Teir eru:***

| | |
|---|---|
| **Víkingur - HB** | kl. 15.00 |
| **B36 - B68** | kl. 15.00 |
| **FC Suðuroy - NSÍ** | kl. 15.00 |
| **AB - B71** | kl. 17.00 |